# Oddagrein

**Kári á Rógvi, ritstjóri**

Fróðskaparsetur Føroya hevur nú boðið út master A. í løgfrøði. Við hesum stigi er komið á mál hjá okkum, sum í síni tíð stovnaðu felagið Føroysk Juralesandi og felagið Føroyskt Lógar Rit.

Vit skipaðu okkum í feløg at menna føroyska løgdømið og stevna fram ímóti gransking og frálæru grundaðum í føroyskari lóg og føroyskum viðurskiftum.

Seinastu árini hevur eydnast okkum at boðið út skeið á master stigi, sum eru góðskrivaði sum partur av M.A. í stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetrinum, sum partur av cand. jur. á Københavns Universitet og øðrum donskum lærustovnum, og sum nú eru grundstøði undir egnu M.A. í løgfrøði á Fróðskaparsetrinum.

Um somu tíð hevur Grundskeið í lóg vunnið sær sætið sum karmurin um løgliga skipaða fyrisiting í Føroyum; umleið 600 fólk hava tikið hetta skeið, sum á bachelor stigi gevur innføring í háttalag hjá lógkønum og letur upp høvi at samskifta við tey lógkønu og lesa lógkønar heimildir. Saman við grundleggjandi fyrisitingarlóg, 1-ára diplom í almannafyrisiting og øðrum tiltøkum, hevur eydnast okkum at leggja ávíst løgfrøðiligt støði undir føroyska fyrisiting – bæði fyri lesandi á ymsu samfelagsligu útbúgvingunum og fyri fólk við øðrum førleikum í privatari og almennari fyrisiting.

Framgongdin á so mongum økjum hevur tó verið til ávísan bága fyri lógarritið. Síðani 2007 hevur felagið ikki megnað at givið út ritið. Í hesum sama tíðarskeiði er eydnast at geva út lærubøkur, at vinna føroyskum lógkønum innivist í donskum og altjóða útgávum, og mangar góðar uppgávur um føroyska lóg eru latnar inn á Fróðskaparsetrinum og aðrastaðni, so framleiðslan av viðkomandi tilfari er økt hesi árini. Men tíverri var ikki millum hesi avrit tann áhaldandi útgávan av FLR.

Tí er okkum stór gleði, at vit nú fara undir aftur at geva út greinir um føroysk viðurskifti grundað á gransking og undirvísing í Føroyum, umframt annað tilfar viðkomandi fyri føroyska løgdømið.

Felagið Føroyskt Lógar Rit hevur givið seg upp til Fróðskaparseturs og latið Setrinum bæði fæ og tilfar í varðveitslu. Vit vænta tí at síggja greinasavnið á støðlað á www.flr.fo og www.setur.fo/flr og framtíðar útgávur okkara fara helst at vera árliga í prentlíki og leypandi teldutøkar.

Eftir er so bert at møta tvinnanda avbjóðingum. Fyrra er tilfar, sum man fara at ganga væl, tí ásett er fyri master í løgfrøði, at tey lesandi skulu skriva útgávuverda grein sum part av útbúgvingini, og mangar frálíkar uppgávur eru longu skrivaðar

á høgum stigi, umframt at mangir gløggir løgfrøðingar hava áhuga fyri føroyskum viðurskiftum. Seinna avbjóðingin er at skipa fyri. Ætlanin var frá byrjan, at lesandi skuldu vera drívmegin hjá lógarritinum, eins og vit kenna í enskmæltum londum og í Ísland.

Vit ið fegnast um tey higartil náddu málini heita tí við hesum á næsta ættarlið av lógkønum um at seta sær nýggj mál fyri Føroyskt Lógar Rit.